**Stuðulsupphæddir hækka og einsamallir uppihaldarar fáa stuðul í juli**

Frá 1. januar 2017 verða fylgjandi batar framdir á lestrarstuðulsøkinum:

1) Stuðulin til lesandi á hægri útbúgvingum og á styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingum hækkar við kr. 500 um mánaðin – úr kr. 3.815 til kr. 4.315. Árliga er hækkingin kr. 5.500.
2) Stuðulin til teirra, ið eiga børn, hækkar við kr. 34 um mánaðin fyri hvørt barnið – úr kr. 966 til kr. 1.000. Árliga hækkingin fyri hvørt barnið er kr. 374.
3) Stuðul verður veittur einsamøllum uppihaldarum 12. mánaðin – í juli. Talan er kr. 4.315, + kr. 1.538 (ískoytisstuðulin til einsamallar uppihaldarar) + í minsta lagi stuðul fyri eitt barn, kr. 1.000. Tilsamans í minsta lagi kr. 6.853 árliga.

Dømi: Einsamallur uppihaldari við tveimum børnum, ið gongur á hægri – ella á styttri vinnuførleikagevandi útbúgving, kemur sostatt at fáa kr. 14.101 meira í studningi frá Studna í 2017 enn í 2016.